# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 15. november 2024 |
| Mál nr.: | 24/26341 |
| Málsviðgjørt: | DH/JS |
| Ummælistíð: | 15. nov. til 18. nov. 2024 |
| Eftirkannað: | 14.-15. november 2024 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)**
(Striking av áseting um lægri veiðigjald, tá ið tøka kvotan minkar serliga nógv og nágreining av veiðigjaldi á lodnu)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 1. juni 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 5 verður orðað soleiðis:

“**§ 5.** Veiðigjald á makrel, sild og svartkjaft verður roknað eftir ásetingunum í § 9, stk. 1 og 2 og verður lagt á veiðu, landað 1. august til og við 31. juli.
*Stk. 2.* Veiðigjald á lodnu verður roknað eftir ásetingunum í § 9, stk. 4 og verður lagt á veiðu, landað 1. mai til og við 30. apríl.
*Stk. 3.* Á hvørjum ári, seinast 15. juli, ásetir landsstýrisfólkið í kunngerð veiðigjald fyri makrel, sild og svartkjaft, sum skal vera galdandi 1. august til og við 31. juli árið eftir.”

**2.** Í § 6, stk. 2 verður “, samanber tó § 7, stk. 2” strikað.

**3.** § 7 verður strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í sambandi við, at kvoturnar á makreli lækka í 2025 og møgulig semja um sildina og sínamillum samráðingar standa fyri framman, er møguleiki fyri, at ásetingin í § 7 veiðigjaldslógini verður nýtt. Tað hevur sannlíkt við sær, at inntøkan frá veiðigjøldum lækkar millum 70 og 100 mió kr. í 2025.

Endamálið við undantakinum í § 7 er at taka lægri veiðigjald, um kvoturnar minka serliga nógv, og tað hevur við sær, at vinnan fær munandi lægri inntøkur. Í verandi støðu eru útlit fyri, at kvotan minkar munandi, men hægri prísur vigar upp ímóti, og tí minkar inntøkan hjá vinnuni ikki.

Skotið verður upp at strika § 7 fyri at sleppa undan munandi lægri inntøku til landið, hóast inntøkan frá fiskiskapi ikki minkar.

Um verandi fortreytir broytast grundleggjandi, t.d. um bæði kvotur og prísur minka munandi, er møguligt at gera tillagingar í skipanini við seinni lógarbroyting, sum ikki hava verandi neiligu og ótilætlaðu avleiðingarnar.

*Nágreining av veiðigjaldi á lodnu*
Í seinastu lógarbroyting varð ásett, at gjaldast skuldi fyri veiðirættindi at fiska lodnu.

Veiðigjald á makrel, sild og svartkjaft verður ásett út frá miðalprísum árið fyri og verður ásett í kunngerð, sum skal vera galdandi 1. august til og við 31. juli *árið eftir*.

Hesar reglurnar eru ikki væl egnaðar til lodnu. Lodna verður vanliga fiskað í januar, februar og mars og ofta verður kvotan hækkað bæði í januar og februar. Hesi serligu viðurskifti hava við sær, at stór sveiggj kunnu verða bæði í kvotu og prísi.

Veiðigjaldið á lodnu verður av hesi orsøk ikki ásett frammanundan í kunngerð og fellur ikki til gjaldingar, so hvørt veiðan er landað. Veiðigjaldið verður ásett og fellur til gjaldingar aftaná, at fiskiskapurin vanliga er av. Vørn ger upp veiðigjaldið og sendir eigara av fiskifari rokning eftir at miðal avreiðingarvirðið fyri tíðarskeiðið frammanundan er gjørt upp. Gjaldið fellur til gjaldingar 15. juli á hvørjum ári sbrt. § 12.

Í galdandi lóg er tó ásett, at veiðigjaldið fyri lodnu á hvørjum ári verður ásett í kunngerð eftir somu heimild sum fyri makrel, sild og svartkjaft. Tað er ein feilur, ið kann geva ógreidleika um, hvussu lógin skal umsitast.

Skotið verður tí upp at broyta heimildina at áseta veiðigjaldið í kunngerð sbrt. § 5 soleiðis, at henda bert fevnir um makrel, sild og svartkjaft.

**1.2. Galdandi lóggáva**
§ 7 ásetur, at veiðigjaldið lækkar niður í 50% av veiðigjaldinum, um kvoturnar minka serliga nógv. Endamálið við ásetingini er, at fiskiførunum verður álagt eitt lægri veiðigjald, um munandi lægri kvota hevur við sær, at vinnan fær munandi lægri inntøkur.

Galdandi lóggáva tekur ikki hædd fyri, at hægri prísur ofta vigar upp ímóti eini lægri kvotu. Verandi áseting kann tí virka ímóti sínum endamáli.

*Veiðigjald á lodnu*
Veiðigjaldið á lodnu verður ásett sum eitt prosenttal av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt, og talvan er tann sama sum fyri makrel, sild og svartkjaft. Veiðigjald á makrel, sild og svartkjaft verður ásett út frá miðalprísum árið fyri og verður ásett í kunngerð, sum skal vera galdandi 1. august til og við 31. juli árið eftir.

Veiðigjaldið á lodnu verður ásett og fellur til gjaldingar aftaná, at fiskiskapurin vanliga er av. Við hesum verður atlit tikið til, at veiðigjaldið, vegna stór sveiggj bæði í kvotu og prísi, ikki er egnað at verða ásett frammanundan við støði í miðal avreiðingarvirðinum árið fyri.

Vørn ger veiðigjaldið upp og sendir eigara av fiskifari rokning eftir, at miðal avreiðingarvirðið fyri tíðarskeiðið frammanundan er gjørt upp, og fellur veiðigjaldið til gjaldingar 15. juli á hvørjum ári. Neyðugt er tí ikki at áseta nærri reglur um veiðigjald fyri lodnu í kunngerð.

Í galdandi lóg er ásett, at veiðigjaldið fyri lodnu á hvørjum ári verður ásett í kunngerð, eftir somu heimild sum fyri makrel, sild og svartkjaft. Tað er ein feilur, ið kann geva ógreidleika um, hvussu lógin skal umsitast.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
*Strika áseting um lægri veiðigjald, tá ið kvotan minkar serliga nógv*
Galdandi lóggáva tekur ikki hædd fyri, at hægri prísur ofta vigar upp ímóti eini lægri kvotu. Í løtuni er tað støðan. Eftir semjuna um makrelin, er prísurin á makreli meira enn tvífaldaður, og semjan ger, at fiskast kann meira effektivt enn áður. Samstundis verður veiðigjaldið ásett eftir avreiðingarvirðinum fyri árið frammanundan. Verandi áseting virkar sostatt ímóti sínum endamáli.

Skotið verður upp at strika undantakið, sum ásetur lægri veiðigjald, tá ið kvotan minkar serliga nógv.

*Veiðigjald á lodnu*
Skotið verður upp at broyta heimildina at áseta veiðigjaldið í kunngerð sbrt. § 5 soleiðis, at henda bert fevnir um makrel, sild og svartkjaft. Endamálið er at rætta ein feil í galdandi lóggávu, sum kann geva ógreidleika um, hvussu lógin skal umsitast.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Skotið verður upp, at strika verandi áseting um lægri veiðigjald, tá ið kvotan minkar serliga nógv. Ásetingin kann hava ta ótilætlaðu avleiðing, at veiðigjaldið lækkar, hóast inntøkan hjá vinnuni ikki minkar, tí hægri prísur vigar upp ímóti eini lægri kvotu.

Skotið verður upp, at heimildin at áseta veiðigjaldið í kunngerð fyri árið eftir sbrt. § 5 verður broytt soleiðis, at henda bert fevnir makrel, sild og svartkjaft. Veiðigjaldið fyri lodnu verður eftir galdandi lóggavu ikki ásett í kunngerð fyri árið eftir, men verður gjørt upp eftir, at fiskiskapurin vanliga er av.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið er sent til ummælis hjá Reiðarafelagnum, Felagið Nótaskip, Vørn og Fiski- og samferðslumálaráðið.

Uppskotið liggur harumframt til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri.

Freistin er: mánadagin 18/11-24 kl. 12:00

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Um ásetingin í § 7 verður virkin, merkir tað, at veiðigjaldið fyri 2025 minkar 50% .

Fyri makrel merkir tað, at veiðigjaldið frá 1. jan til 31. juli verður sett niður úr 1,45 kr/kg til 0,725 kr/kg.

Við verandi prísgongd verður veiðigjaldið, sum skal lýsast í summar 2025, at galda frá 1. august 2025, væntandi omanfyri 4 kr./kg. Ásetingin í § 7 merkir tó, at veiðigjaldið frá 1. aug. til 31. des. 2025 verður sett niður í góðar tvær kr./kg.

Veiðigjaldið fyri makrel kann tí roknast við at geva um 70 mió. kr. meira í landskassan í 2025 um § 7 í veiðigjaldslógini verður strikað.

Veiðigjaldið fyri sild í 2025 avhongur av fiskiskapinum, sum júst er byrjaður. Higartil er prísurin nakað hægri enn í fjør, sum ger, at veiðigjaldið sannlíkt hækkar við eini helvt komandi ár. Fyri sild er støðan, at um Føroyar gera semju um sildina kann rokast við, at helvtargjald skal latast av roknaða veiðigjaldinum fyri 2025. Í tí førinum merkir avtøkan av § 7, at veiðigjaldið á sild gevur 30 mió. kr. meira í landskassan í 2025.

Samlað sæð, økir avtøkan av § 7 sannlíkt veiðigjaldsinntøkurar millum 70 og 100 mió. kr. í 2025.

Úrslitið á fíggjarlógini fyri 2025 og sjey ár fram verður útjavnað við sjeyndapørtum gjøgnum búskapargrunnin.

Útrokngargrundarlagið í § 7 hevur við sær, at ein møgulig lækking í veiðigjaldninum fellur burtur, tá ið ein tíð er fráliðin, tí lægri kvota í einum ári telur við í útrokngargrundarlagnum fyri árið eftir. Tí er sannlíkt, at lægra veiðigjaldið bert hevði verið galdandi í eitt ár.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Veiðigjøldini eru ein útreiðsla fyri vinnuna. Avtøkan av § 7 merkir tí sannlíkt at veiðigjøldini økjast millum 70 og 100 mio. kr. í 2025.

Veiðigjaldið verður, sambært lógaruppskotinum, kravt inn á sama hátt sum í dag. Tí hevur lógin ongar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Ongir viðkomandi tvørgangandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið strikar ásetingina í § 7 um at lækka veiðigjaldið, tá ið tøka kvotan lækkar serliga nógv.

*§ 5 um veiðigjald á lodnu*
Eingin broyting er í mun til verandi lóggávu. Talan er um eina broyting, sum hevur til endamál at beina burtur møguligan ógreidleika um, hvussu gjaldið verður ásett.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Ongin broyting er í mun til verandi lóggávu.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

*Viðvíkjandi § 5*
Veiðigjaldið fyri lodnu verður ikki ásett í kunngerð fyri árið eftir, men verður gjørt upp eftir at fiskiskapurin vanliga er av. Heimildin at áseta veiðigjaldið í kunngerð fyri árið eftir sbrt. § 5, stk. 2 verður broytt soleiðis, at henda bert fevnir um makrel, sild og svartkjaft. Ongin broyting er í innihaldinum í § 5.

*Viðvíkjandi § 7*
Ásetingin verður strikað.

Tilvísingin í § 6, stk. 2 til § 7, stk. 2 verða strikaðar.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 14. november 2024

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: